# Eingin eyðsýndur avbjóðari er í eygsjón




*Oddaliðið úr HB hevur hvørja ferð higartil spælt í Gundadali, og tað gera teir eisini næstu ferð, men síðani skulu teir fýra ferðir upp í slag spæla á fremmandum graslíki*

**HB hevur higartil bara hildið til í Gundadali, og enn hava avrikini hjá hinum ikki boða frá, hvør skal bjóða oddaliðnum, sum framvegis hevur fult stigatal, av í kappingini um gullkrónurnar**

3. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Verkfallið er av, og harvið eru fótbóltskappingarnar og fótbóltsskráin komin í tryggu leguna, sum tær eiga at vera í. Í vikuskiftinum vórðu útsettu dystirnir í 2. og 3. deild fingnir frá hondini, og so mugu vit vóna, at einki óvæntað fer at stinga seg upp, sum fer at órógva kappingarnar.

Um tað hevði borið til at vedda um úrslitini í bestu føroysku fótbóltsdeildini, so høvdu vinningarnir hesa ferð verið heilt smáir. Úrslitini vóru øll soleiðis, sum tað kundi roknast við.

NSÍ fekk javnleik í Vági. Í NSÍ iðra teir seg sjálvandi um, at tað ikki eydnaðist at gera sær dælt av, at teir vóru ellivu ímóti tíggju í meiri enn ein hálvan tíma. Men hagtølini siga, at NSÍ ofta hevur tað trupult í Vági. Har hava teir tapt trý tey seinastu árini – í fjør taptu teir 5–0. Síðsta góða úrslitið hjá NSÍ í Vági var í 1998. Tá smurdu teir VB av við 5–0.

## HB eigur heimavøll hvørja ferð

Einasta liðið, sum hevur vunnið allar tríggjar tær fyrstu ferðirnar, er HB. Eitt sindur merkisvert er tað, at HB hevur spælt allar tríggjar landskappingardystirnar á heimavøllinum í Gundadali. Tveir hava verið heimadystir, og sunnudagin var fyrsti útidysturin á skránni – ímóti B36.

Einki skal takast frá sannførandi innganginum hjá HB. Onkuntíð hava teir havt tað torført í Gundadali ímóti KÍ og NSÍ, og grannadystirnar ímóti B36 ber tað ongantíð til at rokna út. Men í ár hevur HB staðið allar tríggjar royndirnar og tað við ein glans. Málmunurin 10–2 talar fyri seg.

Uppaftur meiri merkisvert er tað, at HB eisini í fjórða umfarinum eigur heimadyst. Sunnudagin fáa teir vitjan av GÍ. Sambært upprunaligu skránni skuldi HB havt spælt á Svangaskarði í fyrsta umfarinum. Sum kunnugt so var tað orsaka av verkfallinum neyðugt at broyta skránna, og so var HB eisini í fyrsta umfarinum á heimavølli.

Sjálvandi er tað ein fyrimunur at spæla á heimavølli, og um tað gongst væl, so ber væl til at ímynda sær, at sjálvsálitið er økt heilt nógv, tá tørnið við nógvum útidystum kemur fyri. Frá og við fimta og til og við áttanda umfarinum skal HB spæla fýra útidystir á rað – í Vági, á Toftum, á Skála og á Eiði. Hesin veruleikin ger, at tað hevur stóran týdning fyri higartil sannførandi oddaliðið, hvussu tað fer at ganga, tá GÍ sunnudagin skal í Gundadal.

GÍ eigur at vera besta áminningin til HB um, at tað liðið, sum er sannførandi oddalið undan summarsteðginum, ikki nýtist at enda sum meistaralið. Eftir tíggju umfør í fjør var GÍ fimm stig frammanfyri B36, sum var fremst eftir átjan umfør.

## Eingin avbjóðari

Fyrsti sættiparturin av kappingini er lagdur afturum. Avrikini higartil hava víst, at liðini ikki eru í fullgóðari venjing. Hetta er eisini galdandi fyri oddaliðið. HB segðist ikki vera serliga sannførandi, tá teir vunnu stórt ímóti KÍ.

Umframt HB er tað bara B68, sum ikki hevur tapt. Einastu stigini, sum teir hava mist, var í javnleikinum ímóti GÍ. Spurningurin er nú, um GÍ fer at megna tað sama á útivølli ímóti HB, sum teir megnaðu ímóti B68. Sigurin hjá GÍ ímóti Skála var tann fyrsti hjá gøtumonnum í ár. Men hann var teimum dýrt keyptur. Bartal Eliasen sá gult og verður leikbannaður í Gundadali sunnudagin.

Um tað fer at ganga, sum tað higartil hevur gjørt, so er lagt upp til stórdyst, tá HB í sætta umfarinum skal á Svangaskarð.

Avrikið hjá B68 ímóti EB/Streymi boðaði ikki frá, at toftamenn kunnu roknast at hoyra til støðugu oddaliðini. Komandi sunnudag skal B68 spæla á heimavølli ímóti KÍ. Eftir at TB hevði lagt rygg til tap ímóti B68 á Sevmýri, vóru tvøråmenn eyðmýktir í Klaksvík, har heimaliðið vann fyrstu stigini og fyrsta sigurin á árinum. Sunnudagin fer at síggjast á Svangaskarði, hvør dugur er í klaksvíkingum.

B36 vann bæði FM og steypakapping í fjør. Tí varð undan kappingarbyrjan roknað við, at teir fóru at vera millum avbjóðararnar til FM. Úrslitini higartil hava ikki verið nakað serlig, men í B36 kunnu teir troysta seg við, at tað heldur ikki gekk nakað serligt fyrstu umførini í fjør. Tá fýra umfør vóru farin høvdu teir tapt eina ferð – GÍ vann í fjórða umfari 3–1 á heimavølli ímóti teimum – og eina ferð høvdu teir spælt javnt – málleyst í fyrsta umfarinum í Runavík. Men so gekk undan hjá B36, sum vann tólv dystir á rað. Í trimum teimum fyrstu umførunum í ár hevur B36 mist fýra stig, og miðvallarspælið hevur á ongan hátt verið sannførandi. Men tað er framvegis møguleiki fyri somu úrtøku sum í fjør.

VB og NSÍ hava saman við B36 og GÍ fýra stig, men sum hjá øllum hinum hava avrikini og úrtøkan hjá hesum báðum liðunum verið sera óstøðug.

## Botnurin hongur væl uppií

Skála er einasta liðið, sum higartil ikki hevur megnað at vinna. Eftir trý tey fyrstu umførini hava uppflytararnir eitt stig. Málmunurin 2–4 sigur, at talan á ongan hátt hevur verið um niðurspæling, og tað er ein veruleiki, at kontraspælið hjá teimum hevur sett rættuligt trýst á bæði B36 og GÍ.

Tá Skála í fyrsta umfarinum tapti á Eiði varð sagt, at tað kundi fara at vísa seg, at hetta var eitt lagnutap. Úrslitini síðani hava víst, at sannlíkið fyri hesum er ikki minkað. Sunnudagin eigur Skála heimavøll ímóti VB, so skulu teir til Runavíkar og Klaksvíkar. Tað er væl hugsandi, at stigaposin hjá skálamonnum verður væl tyngri eftir sætta umfarið, enn hann er nú.

EB/Streymur hevur eftir sigurin á Skála vunnið tvær ferðir. Men teir eru ikki avbukaðir. Málmunurin er 2–3, og sunnudagin var ikki stórur munur á teimum og næstfremsta liðnum. Komandi sunnudag skal NSÍ norður til Eiðis at vitja Trygva Mortensen og hansara menn.

Eftir kærkomna heimasigurin ímóti VB í fyrsta umfarinum hevur tað ikki hilnast væl hjá TB. Teir hava lagt rygg til 4–1 tap á heimavølli ímóti B68, og sunnudagin vóru teir úti fyri fyrstu eyðmýkingini í ár. Tvær tær næstu ferðirnar eru B36 á Sevmýri og GÍ í Sarpigerði á skránni. Tað verður strevið. Í sætta umfarinum skulu tvøråmenn taka ímóti EB/Streymi. Tann dysturin fer ivaleyst at hava heilt nógv at siga fyri, hvør skal eiga ivasama heiðurin at verja borg niðanfyri niðurflytingarstrikuna.



KÍ–TB:

# KÍ svam í stórum møguleikum

**Tvørámenn høvdu einki at bjóða uppá og løgdu rygg til eyðmýkjandi tap, tá spælandi KÍ venjarin gjørdi hattrikk**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað var av fagrasta summarveðri í Klaksvík 2. hvítusunnudag. Og hóast tað KÍ var niðast á støðutalvuni eftir tvey tey fyrstu umførini, so vístu klaksvíkingar og norðoyingar yvirhøvur, at teir eru trúfastir ímóti KÍ. Skýlið var stappað við fólki, og kring vøllin var gylt av fólki, sum hugnaði sær í góðveðrinum og frøddist um, at tað endiliga var komið hol á málskjótingina og innheystingina av stigum.

TB tapti fyri fýra árum síðani 10–0 í Klaksvík. Ta ferðina skoraði Kurt Mørkøre fimm mál. Síðani tá hevur TB ikki verið í 1. deild og tískil ikki spælt ímóti teimum bestu klaksvíkingunum.

Undan ferðini til Klaksvíkar segði Zoran Mancic, sum var á KÍ liðnum fyri fýra árum síðani, at teir sanniliga vónaðu, at tað hesa ferð fór at ganga hópin betri, enn tað gjørdi fyri fýra árum síðani, og at teir fóru at verða meiri enn fegnir um at fáa eitt stig.

Tað royndist næstan eins illa hjá TB, sum tað gjørrdi fyri fýra árum síðani, og høvdu klaksvíkingar verið meiri neyvir og avgjørdir í 2. hálvleiki, so kundi tað so væl verið, at teir høvdu vunnið við tvey sifraðum tølum.

Kurt Mørkøre helt seg heldur ikki hesa ferð aftur ímóti TB. Í 2. hálvleiki skoraði hann trý mál, og hann var við í uppspælinum til fleiri av hinum. Kurt er ikki í venjingarstøðuni, sum hann onkuntíð hevur verið í, og spurningurin er, hvussu nógv hann fer at megna, tá mótstøðuliðið og verjuspælararnir verða betri, enn teir hjá TB vóru hesa ferð. Men ímóti tvørámonnum hefti einki fyri.

TB – uttan Radosavlovic – var í 5–3–2 útgangsstøðu. Teir royndu at binda um í verjupartinum. Royndirnar fram eftir vøllinum vóru fáar og smáar. Einar tríggjar ferðir royndu teir við skotum úr 16–18 metrum. Tað var barnamatur hjá Meinhardti Joensen.

Hvørja ferð sekundvísarin fór eina ferð runt, uttan at KÍ hevði fingið hol á, mundi kennast sum ein sigur hjá TB. Trettan ferðir vunnu teir hesar smáu sigrarnar. So kom hol á, og so var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur heimasigurin fór at verða.

KÍ var bara frammanfyri 2–0 í steðginum. Beinanvegin eftir steðgin øktu teir til 3–0, og so datt korthúsið hjá TB saman. Lars Müller í TB málinum hevði fleiri bjargingar, og KÍ spælararnir tóku sær av løttum.

KÍ hevur verið rakt av fleiri skaðum. Allan Joensen treiskaðist enn eina ferð, men tað var skjótt, at hann noyddist at taka seg av vøllinum. Tá varð Atli Danielsen fluttur í miðverjuna, meðan Erling Fles kom á vongverjan í høgru.

### Málini

Jan Joensen, sum hesa ferð var sentralur miðvallari saman við Hjalgrími Elttør, setti hol á við góðum langskotiúr umleið 20 metra fjarstøðu.

Tá vóru trettan minuttir farnir, og níggju minuttir seinni var Heðin á Lakjuni fyrstur á innleggi úr vinstru frá Kurt Mørkøre.

Seinna umfarið var fýra minuttir gamalt, tá Kurt Mørkøre skoraði, eftir at Hjalgrím Elttør hevði spælt hann leysan, og sjey minuttir seinni býttu teir um leiklut. Ta ferðina var talan um skot hjá Hjalgrími úr stórari fjarstøðu.

Í 63. minutti økti Kurt Mørkøre til 5–0, og tá Hjalgrím Elttør økti til 6–0 restaði eitt korter. Talan var um fínt uppspæl, har Allan Mørkøre og Kurt Mørkøre áttu sín part. Kurt Mørkøre setti sjálvur punktum, og tað sást týðuliga, at gamli málrevurin framvegis eigur stóran kreditt millum KÍ viðhaldsfólkini.

### Dysturin í tølum

**KÍ-TB 7-0**
1-0: Jan Joensen 13
2-0: Heðin á Lakjuni 22
3-0: Kurt Mørkøre 49
4-0: Hjalgrím Elttør 56
5-0: Kurt Mørkøre 63
6-0: Hjalgrím Elttør 75
7-0: Kurt Mørkøre 82
Dómari: Birgir Sondum

KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Allan Joensen, Alexander Djordjevic, Harley Bertholdsen – Allan Mørkøre, Hjalgrím Elttør, Jan Joensen, Bárður á Lakjuni – Kurt Mørkøre, Heðin á Lakjuni
TB: Lars Müller – Bárður Dimon, Tórður Mortensen, Vladimir Matijvic, Olivur Abrahamsen, Rasmus Nolsøe – Allan Mikkelsen, Nebosja Urtajl, Jón Tórður Holm – Dan Mortensen, Zoran Mancic




*Kurt Mørkøre var hesa ferð við í KÍ álopinum, og leikandi venjarin staðfesti sítt virði við at skjóta trý av teimum sjey KÍ-málunum*

*Mynd: SáH*

# Hjalgrím fegnast um at turkurin er burtur

**Fyri fyrstu ferð síðani 10. juni í 2000 eydnaðist tað unga og annars málsókna spælaranum at fáa mál í landskappingini**

TVÍFALDUR MÁLSKJÚTTI
*Jóannes Hansen*

Hjalgrím Elttør var ovurfegin, tá hann ellivu minuttir eftir steðgin 2. hvítusunnudag økti KÍ leiðsluna ímóti TB til 4–0. Gamli málslúkurin hjá KÍ og trífaldi málskjúttin hesa ferð, Kurt Mørkøre, átti næstsíðsta fótin á, og so sendi Hjalgrím í kassan úr seytjan metra fjarstøðu.

At ungi maðurin, sum í steypakappingini og á unglingaliðnum ferð eftir ferð hevur víst, at hann hevur gott máltev, var ovurfegin, var ikki so undarligt. Hetta var fyrsta ferðin síðani sunnudagin 10. juni í 2000, at hann skoraði fyri KÍ í 1. deild. Ta ferðina kom Hjalgrím inn á Sandi, tá tað restaðu seks minuttir, og í síðsta minuttinum staðfesti hann 4–0 KÍ sigurin.

Í dystinum framman undan – tá vann KÍ 9–0 á Sumba í Klaksvík – hevði Hjalgrím spælt 20 minuttir og skorað eitt mál. Neyvan nakar og als ikki Hjalgrím Elttør sjálvur mundi óðra á Sandi sunnudagin í juni fyri tveimum árum síðani, at hann stóð frammanfyri tvey ára longum málturki.

– Tað var frágera gott, at tað eydnaðist at skora aftur. Í steypakappingini í fjør skoraði eg sjey mál, og eg skoraði eisini okkurt málið í steypakappingini í vár, sjálvt um vit ikki fingu so nógv mál. Í unglingadeildini havi eg javnan skorað, men tað er klárt, at eg havi kent eitt ávíst trýst á mær, tá tað ikki hevur eydnast at skora í 1. deild. Ikki minst eftir at eg misnýtti brotsspark í fyrsta heimadystinum í ár, sum var ímóti B36. Teir vunnu 3–2.

Hví hevur tú ikki skorað?

– Tað hevur ikki gingið eftir vild, og marginalirnir hava ofta verið ímóti. Men so haldi eg eisini, at tað er rætt at leggja afturat, at eg havi ikki spælt so nógv í álopsplássinum, sum mær dámar best at spæla í, og sum natúrliga er tað plássið, sum ber flestu málmøguleikarnar við sær. Í fjør spældi eg ofta í síðunum, og nú havi eg spælt nógv á miðvøllinum. Men ímóti TB eydnaðist tað tvær ferðir, og tað var heilt gott.

Hvussu verður nú?

– Vit kunnu ikki annað enn fegnast um henda sigurin og so taka ein dyst í senn. Sunnudagin skulu vit út á Toftir. Tað verður ein sera torførur dystur hjá okkum, men vit mugu royna og trúgva upp á, at tað fer at bera til. Vit mugu eisini vóna, at vit ikki fara at verða so plágaðir av skaðum. Allan Joensen noyddist aftur út hesa ferð. Tað er ein stórur missur, tá hann ikki er við. Ove Nysted er eisini skaddur, og Jan Andreasen er ikki komin fyri seg aftur enn. Tað merkist, men vit fara at gera okkara besta. Tað verður í hvussu so er hugaligari at fara at venja, enn tað hevur verið. Eg haldi, at vit hava arbeitt seriøst, men sjálvandi er tað ikki eins stuttligt, tá vit tapa, sum tað er, tá vit vinna, heldur Hjalgrím Elttør.

Sjálvandi vónar 19 ára gamli maðurin, at tað nú fer at verða títtari millum málini hjá honum, enn tað hevur verið í landskappingini seinastu tvey árini.